Viðmerking:

# Vælsignaðu javnaðarfólk!

Á landsfundi um vikuskifti kann Javnaðarflokkurin velja at taka síni egnu stevnumið í álvara, og stuðla royndunum at fáa ein góðan felagsskap millum Føroyar og Danmark, ella at seta seg uttan fyri alla ávirkan á størsta politiska mál í Føroya søgu. Velur hann at standa uttanfyri, skaðar hann fyrst og fremst seg sjálvan.

**Kæru javnaðarkvinnur- og menn!**
Eg síggi í bløðunum, at tit skulu hava landsfund um vikuskiftið, har støða skal takast til sjálvsstýrismálið, sum skilst.

Fari tí í hesum sambandi virðiliga at venda mær til tykkara við nøkrum fáum orðum.

Tit hava leingi ført fram, at vit skulu hava sjálvstýri. Heimastýrislógin dugur ikki, hava tit sagt í nógv ár.

Og tit hava lagt fram nøkur stevnumið um, hvat gerast skal. Høvuðsstevnumiðini eru hesi:

- Vit skulu gera ein nýggjan felagsskap millum Føroyar og Danmark.
- Í felagsskapinum skulu londini vera sjálvstøðug og javnsett.
- Føroya Løgting skal vera hægsti myndugleiki í Føroyum.
- Føroyingar og danir skulu hava full rættindi hvør hjá øðrum.
- Vit skulu hava egna rættarskipan.
- Blokkurin skal minkast burtur á varligan hátt, soleiðis at vit kunnu byggja upp ein sjálvstøðugan búskap.

Nú er komið fram, at landsstýrið hevur tikið tykkum upp á orðið. Øll tykkara høvuðsendamál eru vorðin til politikk landsstýrisins. Tá farið verður til Danmarkar at samráðast, eru tað í stóran mun tykkara sjónarmið, sum samgongumenn hava við í skjáttuni.

**Eitt sjálvstøðugt land:**
Tað einasta av tykkara ynskjum sum ikki er við, er, at vit skulu verða verandi undir donskum yvirvaldi. Men hesum ynski ber ikki til at eftirlíka, tí tit siga eisini, at Føroyar skulu vera eitt “sjálvstøðugt land”.

Og fortreytin fyri vit kunnu vera eitt sjálvstøðugt land er sjálvsagt, at vit _ eru eitt sjálvstøðugt land. Og eitt sjálvstøðugt land verða Føroyar ikki, so leingi tær eru undir donskum yvirvaldi.

Eg vóni at tit standa við tykkara ynski um at Føroyar skulu vera eitt sjálvstøðugt land. Gera tit tað, ásanna tit at evsta vald liggur í Føroyum og ikki í Keypmannahavn. Sostatt mugu tit sleppa ynskinum um, at yvirvaldið yvir oyggjunum skal liggja í Keypmannahavn.

**Semjan er breið, eisini uttan tykkum:**
Um tit vraka tykkara egnu stevnumið og ganga ímóti ætlanini, hava vit tríggjar partar í hesum spurningi á tingi. Í einum eru seks ting-



menn (tinglimir), í einum eru sjey - og í einum eru nítjan!

7. Teir seks eru sambandsmenninir. Teir vilja ikki hava nakra veruliga broyting.

8. Teir sjey eru javnaðarmenninir. Teir hava somu stevnumið sum samgongan. Hvørja støðu teir taka um teir endaliga vraka hesi stevnumið, veit eingin. - Men at stovna eitt “sjálvstøðugt land” undir teirri donsku grundlógini, ber ið hvussu er ikki til.

9. Í tí triðja partinum eru 19 menn úr fýra flokkum. Teirra ætlan er fyrireikað í skjótt tvey ár, og er tað nágreiniligasta og best undirbygda uppskot um ríkisrættarligar broytingar, sum nakrantíð er gjørt í Føroyum. Tað er søguligt. Og at 19 av 32 tingmonnum semjast um at gera broytingar á økinum, er ikki minni søguligt.

Tit mugu ikki halda at ætlanin (les: stevnumið Javnaðarfloksins) verður slept, fyri tað um tit ikki stuðla. Eingin vrakar sína egnu og væl tilrættisløgdu ætlan. Og so slett ikki tá hon er einasta veruliga alternativ.

**Vælsignaðir stuðlið!**
Men um tit velja ikki at stuðla kann tað sjálvsagt hava við sær, at okkara samráðingarmenn standa veikari. Kanska fáa teir tí eisini eina verri avtalu, enn teir kundu fingið. Um tað hendir, rakar tað alt føroya fólk. Tí vildi tað undrað meg, um tit ikki vilja landi og fólki tað besta.

Eg vóni ikki at tit fara at svíkja tykkara egnu stevnumið. Tað fer við vissu at raka tykkum sjálvar.
Tí hvat skulu tit so gera? Standa einsamallir? Ella kasta saman við Sambandsflokkinum?

Hvørki av hesum kann føra til nakað úrslit. Tit fara at standa í einum politiskum tómrúmi. Og tað verður trupult at taka ein flokk fyri fult, sum gongur frá sínum egnu stevnumiðjum.

Stuðla tit, kunnu tit hinvegin vera við til at tryggja okkum øllum ein góðan felagsskap millum Føroyar og Danmark, har londini samstarva sum javnbjóðis partar.

Stuðla tit ikki, kunnu tit bara gera tykkum sjálvum og landinum skaða.

Tí verður mín inniliga áheitan á tykkum um at stuðla samráðingunum! Eingin er verri farin, um tað eydnast samráðingarmonnunum at fáa ein góðan felagsskap millum Føroyar og Danmark.

**Jóannes Dalsgarð**

# Kunning ella villeiðing



Føroya Landsstýri hevur enn einaferð lagt eina heimasíðu um fullveldi út á internetið.

Ímeðan føroyskir pensjonistar ikki hava ráð til at halda jól, sjúkrahúsverkið noyðist at siga fólk úr starvi og Strandfaraskip Landsins sigla við hálvum seglum, so tykist einki mark vera fyri, hvussu nógvur peningur kann nýtast til fullveldisætlan landsstýrisins.

Nú kom so aftur ein nýggj heimasíða út á internetið, sum skal _kunna“ føroyingar um fullveldið. Alment skal henda ”kunning” helst eitast at vera objektiv, men innihaldið líkist tó meira eini einvísari sølulýsing.

**Hjálparloysi ella sjálvbjargni**
Millum alt tað, ein kann lesa inni á hesi heimasíðu, er ein grein hjá Høgna Hoydal landsstýrismanni, ið kallast _Hjálparloysi ella sjálvbjargni”.

Sum alt annað skrivligt frá Høgna Hoydal, so kann eisini henda greinin kallast ”eitt sálarfrøðiligt vælaverk”. Føroyingurin skal sambært greinini velja ímillum annaðhvørt at vera hjálparleysur (í ríkisfelagsskapi) ella sjálvbjargin (við fullveldi).

Ótrúðliga ”smart” yvirskrivt, tí hvør vil ikki vera sjálvbjargin og hvør vil vera hjálparleysur,?

**Samling av negativum orðum**
Inni í greinini verður nærri greitt frá, hvat ið liggur í hesum orðum. Undir millumyvirskriftini ”Hjálparloysi sum virkisskrá” stendur um verandi ríkisrættarligu støðu (legg merki til øll tey negativu orðini):

”Vit kunnu velja at leggja dent á okkara **veikleikar** sum eitt **lítið**land og ein **fáment** tjóð. Vit kunnu krevja, at vit sum ein **minniluti** í tí danska ríkinum skulu verða vard móti øllum **vandum**, alheimsgerðin hevur við sær, og at Danmark skal **hjálpa okkum** við øllum, ið vit **ikki klára sjálvi**. At Danmark skal rinda okkum stuðul so leingi vit **ikki klára at fíggja** okkara egna samfelag, og at Danmark skal koma at **bjarga** okkum, tá vit av **ábyrgdarloysi og býttiskapi** eru farin **á húsagang.** Vit kunnu stutt sagt gera okkum **ússalig** fyri at yvirliva”.

Víðari verður tosað um at **sita óvirkin og bíða**eftir at olja kanska verður funnin o. s. fr. — Sum um at tað heldur ikki ber til at arbeiða, meðan vit eru í ríkisfelagsskapi.

**Einkisigandi positiv orð**
Síðani stendur millumyvirskriftin ”Sjálvbjargni sum virkisskrá”. (Legg nú merki til øll tey positivu orðini, og hugsa samstundis um, hvussu lítið tey veruliga siga).

”Vit kunnu eisini velja at **taka ábyrgdina** fyri okkum sjálvum. Vit kunnu seta okkum **greið mál** fyr, hvussu vit kunnu **leggja lunnar undir** og **byggja upp** eitt samfelag, sum **stendur á egnum beinum”**.

”Vit kunnu leggja dent á **møguleikar** og **loysnir** í staðin fyri veikleikar og avmarkingar”.

*”Vit kunnu grunda okkara politikk á teir* ***fyrimunir****, vit hava sum ein fáment tjóð. Á okkara* ***sterku felagskenslu****. Á okkara* ***sterka mentanarliga samleika****. Á at vit eru* ***so fá, at øll telja við*** (!). *Á at vit hava* ***størri møguleika enn onnur*** *at* ***skapa eina samanhangandi og burðardygga politiska og búskaparliga eind”*****.**

Álvaratos ! — Hvørjum av øllum hesum kunnu vit liva av í framtíðini ?

**Danskir politikarar sum skurkar**
Undir millumyvirskriftini ”Avoldað nationalisma má ikki steðga gongdini”, verður víst á, at alheimsgerðin av búskapi og samskifti gevur øllum smáríkjum **einastandandi møguleikar**, fyri at gerast ein virkin partur av heimssamfelagnum. Treytin fyri hesum sigur Høgni Hoydal tó vera, at londini eru fullveldi.

Men hetta krevur vælvild frá (í okkara føri) Danmark. Og so verður víst á, hvussu fyrimyndarlig lond sum Spania, Frakland, Italia og Bretland hava verið á hesum øki, meðan danskir politikarar hava sett seg ímóti føroysku fullveldisætlanini.

Eg gangi út frá, at greinin er skrivað, áðrenn Bretland ógyldaði Norðurírska sjálvstýrið, og greinskrivarin hevur neyvan heldur hugsað um Baskaralandið, tá hann skrivaði um ta sponsku fyrimyndina.

Men endamálið er greitt.

Eftir at hava viðmælt fullveldisstøðuni við øllum positivum orðum, sum finnast í hugaheiminum, og eftir at hava lýst verandi støðu sum ”hjálparloysi” og ”bundinskap”, so skulu danskir politikarar gerast til skurkar.

Tað ræður um at vísa føroyskum veljarum, at danir eru okkara fíggindar, sum vit skulu sleppa okkum av við. Sambandsfólk og javnaðarfólk eru landasvíkjarar, meðan orð ikki finnast fyri, hvussu gott sitandi landsstýri er fyri føroya fólk. — Ikki fyri at trútta nakað ávíst niður í lesaran, - men bert fyri at ”kunna” um støðuna — fyri skattgjaldarans rokning.

**Helgi Abrahamsen**

# Tinnitus er einsligt brek

*Felagið fyri hoyribrekað savnar eisini tey, ið líða av tinnitus*

Ein stórur partur av fólkinum plágast av sjóðan ella dunið fyri oyrunum. Fyribrigdið verður rópt »tinnitus«, og tað er ein sannroynd, at mong menniskju eru so hart rakt av hesum breki, at tað ávirkar alla teirra tilveru. Ofta føla fólk seg ógvuliga einsamøll við hesum, tí ilt er at fáa onnur at skilja, hvussu trupult tað kann vera at hoyra ljóð inni í høvdinum dag og nátt - altíð. Væl at merkja eitt ljós, sum onnur ikki hoyra og sum ikki kann mátast.

Serliga tey, ið arbeiða í nógvum gangi og tey ungu, sum lurta eftir hørðum tónleiki, eru útsett fyri at fáa tinnitus. Og vert er at hava í huga: tá hoyrnin er skadd, so vendist ikki aftur. So er hon skadd fyri lívið.

Felagið fyri hoyribrekað savnar eisini tey, ið líða av tinnitus. Vit hava fyrr skipað fyri tiltøkum í hesum sambandi. Men nýggj fólk koma til alla tíðina, sum kenna seg einsamøll við breki sínum. Tí skipa vit leygardagin 26. februpar fyri einum evnisdegi um tinnaður øllum teimum, ið líða av tinnitus og avvarðandi teirra. Tiltakið fer fram í MBF-húsinum í Havn frá kl. 10 til 15. Ætlanin er at kunna um tinnitus frá ymiskum síðum og luttakararnir fáa eisini høvið til at siga frá, hvussu tey uppliva brekið. Nakrir av limum felagsins fara at leggja fyri. Oyrnalæknin og eudiologiassistenturin verða við. Fysioterapeuturin Unn Dimon fer at tosa um avspenning í samband við tinnitus. Á middegi verður døgurði. Øll eru vælkomin til hendan evnisdag, tó krevst tilmelding í seinast alagi mikudagin 23. feb. á tlf. 421144 ella tlf. 313320. Kostnaður fyri dagin 50 kr. Sí eisini lýsing í »Lýsingartorginum«.

Tinnitus er einsligt brek - kanska verður tað lættari, tá tú veitst, hvussu onnur klára at liva við tí.



Viðmerking:

# Ikki tí tað er loyniligt, men tí tað ikki er Javnaðarflokksins politikkur

Niðanfyristandandi tekstur er at finna á heimasíðu landsstýrisins.

**(sitat byrjað)**

Í sambandi við at samráðingarnar standa fyri durum, hevur landsstýrið sent <u>**øllum donskum politikarum**</u> - bæði fólkatingslimum og ráðharrum - eitt eintak av Hvítubók umframt eitt bræv, har greitt verður frá fullveldisætlanini.

(sitat endað)

brot úr brævið - sitat byrjað)



Det er landsstyrets opfattelse, at mulighederne for at opbygge en selvstændig økonomi bliver væsentligt bedre, hvis Færøerne får suverænitet. Suveræniteten vil give adgang til internationalt samarbejde på regeringsniveau, og dermed til udnyttelse af de muligheder, der ligger i globaliseringen af økonomien.

**Bloktilskuddet er dog i dag en så stor del af den færøske økonomi, at den ikke kan falde bort fra dag til anden**. Det, vi lægger op til, er derfor at Danmark og Færøerne indgår en aftale om en overgangsordning, hvor tilskuddet gradvis nedtrappes. Uden en sådan ordning vil udsigterne til økonomisk krise være så truende, at den politiske proces næppe kan gennemføres. Den er således selve forudsætningen for processen.

Erfaringerne viser, at tilskuddet er en spiral. <u>**Hvis det ikke aftrappes, vil det vokse.**</u> Det er derfor <u>**også i Danmarks klare interesse**</u>, at vi sammen finder en holdbar vej ud af afhængighedsforholdet.

Valget står mellem en lempelig overgangsordning eller fortsatte — og voksende — danske overførsler til opretholdelse af et system, hvor der ikke er sammenhæng mellem magt og ansvar.

Også i forsvarspolitisk sammenhæng er det yderst utilfredsstillende for den færøske nation, at den hverken har indflydelse på eller ret til at blive informeret om den militære aktivitet, der er på og omkring øerne. Det har man ikke, så længe suveræniteten over Færøerne ligger i Danmark. Landet er i militærstrategisk sammenhæng rent dansk område. Dette har adskillige gange medført konflikter mellem Færøerne og Danmark, og vil også gøre det i fremtiden, hvis ikke den færøske nation får bestemmelsesretten over sit land også på dette område.

Dette er nogle af hovedgrundene til, at Landsstyret — med Lagtingets flertal bag sig — har sat sig som mål, at den færøske nation skal have suveræniteten over sit eget land, og at der skal indgås en traktat om et fællesskab mellem Færøerne og Danmark, der fastsætter, at der er tale om to formelt ligestillede parter.

<u>Det er meget vigtigt, at hvert eneste skridt i suverænitetsprocessen er grundigt gennemtænkt, og at vi kender konsekvenserne så godt, som det er muligt. Dette er grunden til, at forberedelsesfasen har taget næsten to år.</u>

Men det er også vigtigt, at man i Danmark forstår, hvorfor vi mener, det er nødvendigt at foretage disse ændringer i vores forhold.

**Det er vigtigt, at man i Danmark forstår, at færøsk suverænitet ikke betyder at Færøerne bliver løsrevet fra Danmark, men at hensigten tværtimod er at skabe rammer for et nyt og bedre samarbejde mellem landene.** Et samarbejde, hvor Færøerne er et selvstændigt land, hvor der er klare linier mellem parterne,

og hvor det ikke som nu er den danske skatteyder, der skal betale for velfærden på Færøerne.

(sitat enda)

Tað sum danskir politikarar fáa at vita í brævi frá landsstýrinum, er helst tað sama, sum Javnaðarflokkurin hevur fingið sum upplegg á **”kaffifundunum**”, tí óhugsandi er, at eitt verður sagt her og annað har.

Undirritaði hevur fyrr víst á, at málið hjá landsstýrinum kann náast, um bert tráanin eftir at fáa <u>**sett dato á,**</u> nær eftirkomarar okkara eru førir fyri at standa á egnum beinum, <u>**verður slept.**</u>

Munurin á hvat landstýrið vil, og hvat Javnaðarflokkurin vil, er ofta lýstur.

Hvussu ofta hevur Javnaðarflokkurin ikki sagt at: flokkurin síðan 1981 hevur haft ætlanir um at gera munandi broytingar í ríkisrættarligur viðuskiftunum, og at **skifta út heimastyrislógna við eina sjálvstyrislóg,** tí galdandi heimastýislóg leggur avmarkingar fyri menningini av føroyskum sjálvstýri. Viðuskiftuni eru ógreið í okkara ríkisrættarligu støðu,serliga hvat ábyrgdarplasering viðvíkur. Bert hesar fáu útsagnir Javnaðarflokksins átti at verði ”gloypibiti” hjá núverandi samgongu fyri einum samstarvið.

Javnaðarflokkurin skal um vikuskifti hava landsfund - helst eisini um ríkisrættarligu støðuna.

Eitt er klettafast, Javnaðarflokkurin hevur, og hevur leingi haft eina meining, um ríkisrættarligustøðu Føroya, so tað er nokk ikki tí landsfundur júst skal haldast nú.

**Sitat úr sjávstyrislóg Javnaðarflokksins**
*Hetta vil Javnaðarflokkurin á sjálvstýrisleið*

Javnaðarflokkurin ásannar, at samstundis sum kósin úer sett móti politiskum sjálvstýri, gerst tað uppaftur meira neyðugt, at Føroyar ikki verða avbyrgdar við at avsiga sær samstarvsmøguleikar. Vit hava brúk fyri altjóða samstarvi, og vit hava brúk fyri norðurlendskum samstarvi. Men serliga hava vit brúk fyri tí samstarvi, sum ríkisfelagsskapur er karmur um:

Í ríkisfelagsskapi hava føroyingar í dag stórar ítøkiligar fyrimunir á t.d. útbúgvingarøkinum, sjúkrahús- og heilsuøkinum annars, tí sosiala økinum, tí fyrisitingarliga økinum, arbeiðsmarknaðarøkinum, uttanríkisøkinum, tí tøkniliga økinum og tí mentunarliga økinum. At avsiga okkum samstarv í ríkisfelagsskapi er at avsiga okkum tann sjálvsagda rættin til hesar fyrimunir.

Javnaðarflokkurin ásannar, at tað verður við eitt strævið og tógvið stríð at vinna Føroyum búskaparligt sjálvbjargni við einum minkandi ríkisstuðuli, samstundis sum vit ikki bert skulu varðveita, men eisini framvegis skulu menna tað føroyska vælferðarsamfelagið. Tí hava vit brúk fyri tí tætta samstarvi, sum kann fáast í ríkisfela øgsskapi. Eisini fyri at eiga møguleikan at finna serstakar loysnir, tá umstøðurnar ikki eru okkum til vildar.

Javnaðarflokkurin vil fremja hetta samstarv í einum broyttum og meira rúmsáttum ríkisfelagsskapi millum sjálvstøðug og javnbjóðis lond.

Javnaðarflokkurin ásannar tó eisini, at tann stundin kann koma, at tað verður so stór andsøgn millum áhugamálini hjá pørtunum í ríkisfelags-skapinum, at tað tænir føroysku áhugamálunum best, at Føroyar fara úr hesum felagsskapi.

**Ríkisstuðulin minka burtur**
Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at lutfall verður sett ímillum vøksturin í føroysku tjóðarframleiðsluni og einari minking í ríkisveitingunum.

Eftir hesum leisti kann ríkisstuðulin minkast burtur eftir einum áramáli, uttan at tað fær óhepnar avleiðingar fyri føroyska búskapin og harvið fyri føroysku vælferðina. Hvussu skjótt tað kann gerast, verður treytað av vøkstrinum í føroyska búskapinum.

Tá eru vit komin hagar, at vit kunnu taka støðu til ríkisfelagsskapin, leys av fíggjarligum bindingum.

Hetta merkir, at vit vinna okkum búskaparligt sjálvbjargni, áðrenn vit taka støðu til, um vit skulu fara úr ríkisfelagsskapinum. Tað er greitt, at á henda hátt er nógv meira sannlíkt, at ein altavgerandi partur av fólkinum tekur undir við teirri avgerð, sum tá verður tikin. Og á henda hátt tryggja vit, at broytingar í ríkisrættarstøðuni ikki føra við sær eitt eljustríð, ið fer at oyðileggja politiska umhvørvið í Føroyum í mong, mong ár.

Í innleidninginum til Sjálvstyislógina hjá Javnaðarflokkinum stendur:

(sitat byrjað)
Javnaðarflokkurin ásannar, at eingin er betur førur fyri at avgera, hvat er gott fyri føroyingar, enn føroyingar sjálvir. (sitat endað)

Júst hetta, at føringar sjálvir eru førir fyri at siga nær vit eru sjálvbjargnir, er avgerðandi. Tí eingin skal siga Javnaðarflokkinum, at núsitandi landstýrið hevur so <u>**profetiskar gávur**</u>, at teir vita nær tað hendir, nei tað vita okkara eftirkomarar júst tá — og kunnu taka støðu til tað - júst tá.

Hvat stendur í loyniliga skjalinum í Uttanlandsnevndini er ikki okkara borð (enn) . Men vit kunnu á landsfundinum spyrja okkara formann, um hann heldur, at <u>***okkara***</u> <u>sjálvstýrisuppskot</u> livir upp til tað, sum landstýrið vil<u>, gerð tað ikki tað, so eru vit ikki við,</u> **ikki tí tað er loyniligt, men tí tað ikki er Javnaðarfloksins politikkur.**

**Birgir Waag Høgnesen**




## Hjáveiðuprosentið í lagi

Grundarlag var ikki fyri at ákæra norska frystilínubátin »Øyliner«, tá hjáveiðuprosentið lá um 35 prosent. Seint hóskvøldið var øll lastin vigað og vísti tað seg at hjáveiðuprosentið lá beint oman fyri 35 prosent, og samdust so partarnir um, at reiðaríið skal bera kostnaðin av landingini. Men nú er kunngerðin um tey 30 hjáveiðuprosentini so lýst og var hon ikki tað, áðrenn »Øyliner« var tikin. Klokkan 04 hósmorgunin var »Øyliner« biðin um at sigla inn á Havnina, og ikki fyrr enn tíðliga hósdagin var kunngerðin lýst, so skipið slapp undan eini størri bót á hesum sinni.

# Havnin segði nei

*Býráðið í Havn verður ikki partur av ætlanum Landsbankans um endurfíggjan av kommunuskuldini*



JÁKUP MØRK

Á býráðsfundi í gjár, samtykti Tórshavnar Býráð, at Havnin ikki verður við í eini møguligari endurfíggjan av føroysku kommunuskuldini.

Í Hósdagsblaðnum greiddi Leivur Hansen frá, at Tórshavnar Kommuna hevur sýnt stóran solidaritet í spurninginum viðvíkjandi kommunuskuldini.

Hansara fatan var tó, at føroysku kommunurnar nú vóru somikið væl fyri, at tær sjálvar megna at fáa neyðugu fíggingina, og at tað tískil ikki var neyðugt við eini endurfíggingarætlan.